# Leiðarar í fokus

**Hvør verður Ársins Føroyski Leiðari 2005? Hvat var tað, sum gjørdi, at Reyni Service varð kosið Ársins Virki síðsta ár? Hetta er nakað av tí, sum verður avdúkað á Ársins Leiðaradegi 2005**

LEIÐSLA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nevn tríggjar eginleikar hjá einum góðum leiðara.

Hvør er tann størsta avbjóðingin hjá leiðarum í Føroyum í dag?

Hvørja fyrimynd hevur tú sum leiðari?

Hetta eru nakrir av spurningunum, fimm kendir føroyskir leiðarar fara at svara á Ársins Leiðaradegi 2005 á Hotel Føroyum 27. januar. Tað er skeiðsfyritøkan Synergi, sum skipar fyri degnum, sum endar við at luttakarnir fara at velja Ársins føroyska leiðara 2005 og peika á eina útlendska leiðslufyrimynd.

## Gamaldags leiðslur og nýhugsan

Dagurin verður annars skipaður við eini røð av fyrilestrum um leiðslu og leiðsluhættir. Millum annað spyr Jan Willemoes, arbeiðspsykologur, hví tað er so torført hjá starvsfólkum at samskifta uppeftir, og hvørjar avleiðingarnar av vantandi samskifti eru. Fyrilesturin hjá Jan Willemoes, sum hevur heitið »What´s the problem?«, fer í dypdnina við afturvendandi klaguni hjá starvsfólkum um, at tey onki fáa at vita frá leiðsluni, men heldur fáa alt at vita gjøgnum fjølmiðlarnar. Eru starvsfólkini bara seint uppfatandi, ella eru leiðslur í Føroyum gjøgnumgangandi afturlatnar og gamaldags?, spyr Willemoes í eini roynd at svara hesum spurningi.

»Grava eftir gullinum« er heiti á fyrilestri hjá Thomas Johansen, sum skýtur upp, at starvsfólk halda eyga við tí góða, tey hava gjørt, í staðin fyri at leita eftir trupulleikum. Hugsa vit um, hví ein dagur eydnaðist væl, og hvat vit gjørdu øðrvísi, hava vit eina successøgu, og tað er henni, vit skulu læra av, sigur Thomas Johansen, sum starvast sum systemiskur ráðgevi og coach hjá MacMann Berg.

## Ársins leiðari

Millum føroysku fyrilestrahaldarnar verður eisini høvi at hoyra Ullu Joensen, fíggjar- og fyrisitingarleiðara á Elektron, greiða frá útbúgvingarskipanini hjá fyritøkuni. Ulla fer at greiða frá, hví Elektron hevur lagt so nógva orku í førleikamenningina hjá starvsfólkunum, og hvussu skipanin hevur roynst hesi tvey árini, hon hevur virkað.

Sum kunnugt gjørdist Reyni Service Ársins Virki á Vinnudegnum 2004 fyrr í ár. Krøvini hjá dómsnevndini vóru hørð, og á Leiðaradegnum fáa luttakarnir høvi til at hoyra meir, um hvussu júst hendan fyritøkan livdi upp til krøvini.

Leiðaradagurin endar við, at luttakarnir fara at velja Ársins Leiðara 2005 og siga sína hugsan um aðrar leiðslufyrimyndir.

Aðrir fyrilestrar á skránni hendan dagin eru:

»Úrslitaorienterað leiðsla - Ikki ov nógv bleyt virði« við Vibeke Ib, HR-leiðari hjá Thrane & Thrane.

»Hevur sjálvsleiðsla týdning í leiðsluhøpi?« við Jens Wang, løgfrøðingur.

Framtíðarscenarie - »Creative Man« við Axel Olesen, adm. stjóri á Institut for Fremtidsforskning.

# Harumenn hittast

**15. januar verður skipað fyri stórari veitslu fyri harumonnum og áhugaðum, á Hotel Norð á Viðareiði. Umframt døgurða verða eisini fyrilestrar, ymiskt undirhald og dansur á skránni**

**Viðareiði:**
Tað hevur verið siðvenja, at Hotel Norð hevur skipað fyri haruveitslu, har harumenn kunnu savnast og tosa um farna árið, og hvussu harutíðin royndist. Nakrir av hagapørtunum hava gjørt nógv burturúr, og onkur av hagapørtunum hevur á korti ført inn, hvar í haganum harurnar eru fingnar, ímeðan aðrir hava gjørt nógv burturúr at viga harurnar og eisini staðfest kynið.

Árið í ár hevur eftir tí, sum vit hava frætt, verið rættuliga gott í norðoyggjum, meðan aðrastaðni hava vit frætt um, at árið hevur roynst lakari.

Á haruveitsluni á Hotel Norð í ár verður Dorethe Bloch við, har hon fer at greiða frá sínum kanningum av føroysku haruni, og eisini verður onkur byrsukønur við at greiða frá um skotvápnið, og hvussu farast skal um vápnið. Eisini verður framsýning av byrsum og útgerð til haruskjóting.

## Skráin fyri kvøldið

Byrjað verður kl. 19.00, har menn møtast og seinni verður farið til borðs, har borðreitt verður við trimum rættum: Forrætti, høvuðsrætti og omaná verður dessert og kaffi.

Umframt fyrilestur og frágreiðing verður undirhald við klæðum og undirklæðum, felagssangur og annað. Aftaná verður dansur, har konufólk hava ókeypis atgongd.

Í fjørð vóru harumenn úr øllum landinum á Viðareiði til haruveitsluna og roknað verður eisini við í ár at síggja hópin av harumonnum aðrastaðni frá, tí forkunnugt er at frætta um haruskjótingina aðrastaðni. Tilmelding á telefon 217020 í seinasta lagið 12. januar. Ring og hoyr nærri um møguleikar at gista á hotellinum.



petur & petur • 320870

Gott nýggjár góðu kundar!

PRÍSLÆKKING

av uttanlandstakstunum frá 1. januar 2005

Allir uttanlandstakstirnir eru dagførdir, soleiðis at kundar okkara fáa teir bestu prísirnar á marknaðinum.

1. januar 2005 lækka vit flest allar uttanlandstakstirnar - til fastnetið, GSM og fylgisveinar.

Á **www.tele.fo** síggjast nýggju prísirnir.

FØROYA TELE